## Fleiri vindmyllur

Danska stjórnin hevur sett sær fyri at seta fleiri stórar vindmyllur upp, og seinasta fríggjadag hevði stjórnin fund við átta kommunur, har ætlanin er at seta myllurnar upp. Millum støðini, sum skulu hýsa myllunum, eru Esbjerg, Hirtshals og Frederikshavn. Talan er um vindmyllur, sum vera meiri enn 150 metrar høgar. Endamálið við verkætlanini er at virka fyri, at Danmark skal fáa sum mest av sínari orkunýtslu frá varandi orkukeldum.

## Kópaskinn bílig

Marknaðarprísurin á grønlendskum kópaskinnum er fallin so nógv í vár, og tað hevur gjørt, at Great Greenland hevur lækkað søluprísin ein triðing, skrivar Sermitsiaq. Stjórin í Great Greenland, Michael Nielsen, sigur við blaðið, at fyritøkan fer helst at missa einar 20 mió. krónur í ár orsakað av prísfallinum. Hesaferð er tað ikki mótstøða ímóti grønlendsku kópaveiðini, sum hevur trýst prísin niður, men heldur tað lýggja veðrið í vetur.

Útbyggja gasskeldur fyri 40 mia. kr:

# Atlantmótið álitið hjá Stórabretlandi




**Um somu tíð sum føroyingar bíða í spenningi eftir, hvat komandi boringar eftir olju og gassi fara at bjóða, verða ókannaðu leiðirnar vestan fyri Hetland og eisini tær framvið føroyska markið umrøddar sum framtíðar álitið hjá svanga og vaksandi bretska heimamarknaðinum. Ætlanin er at at brúka góðar 40 milliardir krónur til útbygging av gasskeldum komandi árini**

**ORKA OG ATLANTSMÓT**
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Størsta enn fjalda olju- og gasstilfeingið í bretskum øki er at finna í undirgrundini millum Hetland og Føroyar. Hetta er niðurstøðan, sum bretskir myndugleikar og orkumiðlar bera fram í hesum døgum, nú støðugt vaksandi tørvurin á gassi og olju til risastóra bretska heimamarknaðin bankar harðliga á dyrnar. Henda sannroynd hevur eisini fingið bretskar orku- og vinnumyndugleikar til at leggja uppaftur størri orku í at fáa meiri ferð á olju- og gassleitingina og menningina á Atlantsmótinum.

Framstandandi bretska orkublaðið Lloyd´s List ger nógv burtur úr hesum málinum í eini av sínum seinastu útgávum. Undir yvirskriftini: "Oil majors stake €bn on linking huge fields to Scotland – Block to the west of the Shetland Islands promise to help the UK maximize its resources" (Stóru oljufeløgini vilja brúka góðar 40 milliardir krónur til at útbyggja gassframleiðsluna og undirstøðukervið til Skotlands – leitiloyvi vestan fyri Hetland stóran týdning fyri Stórabretland til tess at menna orkutilfeingið.)

Blaðið skrivar, at bretskir orkumyndugleikar hava sett út í kortið eina stóra útbyggingarætlan fyri alt økið vestan fyri Hetland, har tað liggur í kortunum at skunda undir og eggja stóru oljufeløgini til at troyta longu funnar olju- og gasskeldur eins og enn ókendar goymslur í undirgrundini. Myndugleikarnir vilja við hesum birta uppundir íløguhugin hjá feløgunum, áðrenn tað er ov seint.

Tað vísir seg nevniliga, at nógvar olju- og gasskeldur bara liggja og bíða eftir at verða troyttar. Tær vórðu funnar, tá tøknin ikki var so framkomin og liggja í dag í einum sera fjarskotnum øki langt burturi frá einum infrakervi, sum kann fáa oljuna og gassið til høldar og á marknaðin. Bretsku myndugleikarnir innsíggja, at onkur samskipan og eggjan má til fyri at fáa oljufeløgini at ganga saman um at byggja út ein infrastruktur. sum er grundarlagið undir eini útbygging av verandi gasskeldum. Tað er hetta signalið myndugleikarnir vilja hava út í oljuheimin.

### Útbyggingarætlan í apríl

Herfyri setti DTI, sum er bretska vinnu- og orkumálaráðið ein arbeiðsbólk við umboðum úr nøkrum av teimum stóru oljufeløgunum, sum eru virkin vestan fyri Hetland. Hesin bólkurin skal koma við eini ætlan at leggja fyri myndugleikarnar í apríl um, hvussu man skilabest, bíligast og tryggast kann útbyggja undirstøðukervið vestan fyri Hetland. Feløgini, sum eru við í hesum arbeiði, eru BP, Chevron, ExxonMobil, Total og Dong. Sosialurin skilur, at norska Statoil er eisini við í arbeiðinum, nú felagið er tað mest virkna á føroyska landgrunninum. Bretsku myndugleikarnir meta eftir øllum at døma Føroyaøkið av so stórum týdningi fyri eina samlaða infrastrukturloysn fyri Atlantsmótið, at tað hevur heitt á Statoil í Føroyum um at vera við í arbeiðinum. Rúni Hansen, stjóri í Statoil váttar, at felagið er eisini við í hesum arbeiði út frá tess stóru hjáveru í leiting við Føroyar.

Lloyd´s List skrivar, at uppgávan hjá arbeiðsbólkinum er at koma við uppskotum, hvussu tú fær serstakliga gass frá fjarskotnu leiðunum vestan fyri Hetlands inn á svanga bretska marknaðin. Henda ætlan er partur av endurnýggjaða bretska orkupolitikkinum og fór av bakkastokki í november í fjør. Sambart blaðnum sær bretski orkumálaráðharrin Alistair Darling nakað stórt í eini felags roynd at fáa gass til høldar og flutt á marknaðin, nú tilgongdin vestan fyri Hetland í mongum forum hevur staðið í stað. Tað eru 10 ár síðani, at oljufeløg arbeiddu saman um eina verkætlan nevnd "Aurora", sum hevði sama endamál at finna ein leist til tess at seta hol á mongu gasskeldurnar í økinum. Tá var niðurstøðan tann, at tað var ikki nóg mikið av gassi til tess at fremja eina stóra íløgu í útbygging í framleiðslu og undirstøðukervi.

### Broytingar rætta vegin

Nógv er broytt síðani tá. Nýggj fund eru gjørd, havbotnstøknin er ment nógv, oljuprísirnir eru hækkaðir, og stjórnin hevur tikið sær um reiggj og fingið oljufeløgini at ganga saman um at umhugsa fíggjarligu fortreytirnar av nýggjum. Oljufeløgini, sum hava havt nakrar fundir, umhugsa ymsar møguleikar eitt nú við at brúka havbotnsútbúnað og byggja eina gassframleiðslumiðstøð næstu fimm árini, sum síðani kann binda í eina gassleiðing, ið gongur til stóra gassterminalin St Fergus, norðan fyri Aberdeen. Tað avgerandi er at finna ta mest optimalu loysnina frá byrjan av, tí øll verkætlanin við rørleiðingum, útbúnaði á havbotninum, framleiðsluútgerð og alt eftir hvør loysn verður vald, verður mett at kosta knappar 50 milliardir krónur. At her veruliga er talan um eina ítøkiliga ætlan, sum verður raðfest høgt, stuðla hagtølini, sum siga, at 17% av øllum olju- og gassgoymslum í Bretlandi eru at finna á Atlantsmótinum. Flestu av gassgoymslunum liggja í fleiri keldum, sum ikki eru útbygdar til framleiðslu, men fleiri eru eisini tengdar at oljukeldum í økinum. Metingarnar av verandi gassgoymlum og teimum, sum enn liggja fjaldar í undirgrundini, eru so mikið stórar, at tað fer at loysa seg at fremja eina útbygging við langtrøkkandi rørleiðingum. Gasskeldurnar, sum oljufeløgini í arbeiðsbólkinum, vilja troyta, eru Clair, sum BP umsitur, Laggan, sum Total umsitur, Torridonog Victory, sum Chevron stendur fyri, Tobermory, sum ExxonMobil er fyristøðufelag fyri og oljukeldan Rosebank, sum Chevron hevur um hendi. At danska Dong er við í arbeiðsbólkinum er tí, at felagið er við í fleiri av hesum loyvum, og tí felagið eigur fleiri týðandi loyvi, sum tað skal búna í framtíðini.

### Loysnirnar

Mest sannlíka loysnin er at binda saman allar hesar gasskeldurnar við útbúnaði á havbotninum (subsea flowlines) til eina framleiðslumiðdepil/kjarnu nærhendis Sullom voe terminalinum í Hetlandi. Haðani ein høvuðsgassleiðing kann verða løgd til St. Fergus í Skotlandi. Arbeiðsbólkurin umhugsar eisini at at byggja offshore deplar sum eitt alternativ til hesa loysn. Ein av hesum er at byggja ein framleiðslupall úr stáli at seta upp á grunnum vatni nærhendis Victory gasskelduni ella á Clair oljukelduni. Ein onnur loysn er at skipa fyri eini flótandi framleiðsluskipan á Laggankelduni ella á Rosebankkelduni, sum liggur skamt frá føroyska markinum skrivar bretska blaðið. Tá Rosebank verður nevnt sum ein av loysnunum í framtíðar undirstøðukervinum, so eigur hetta avgjørt at fáa føroysk oljuð og gassáhugamál at rakna við, tí nettupp henda keldan, sum møguliga gongur heilt tætt at markinum ella møguliga inn á okkara undirgrund, kann gerast brúgvabyggjarin til framtíðar oljuð og gassúbygging á føroyska landgrunninum. Her koma Føroyar inn í myndina sum týðandi brikkur í framtíðar puslispælinum á framtíðar leiting og útbygging á Atlantsmótinum sum heild.

Sambært Lloyd´s List so umhugsar oljufelagið Chevron at brúka eitt flótandi framleiðslu og goymsluskip (FPSO) á Rosebankfeltinum at framleiða oljutilfeingið, sum er so mikið stórt sum 500 milliónir tunnur. Ein meira ítøkilig støða kann